# Fundarfrásøgn

Skúlastýrisfundur nr 4-2009/10, tann 19. november 2009, í Norðskála/Oyrar skúla frá kl 19.00 til kl 21.00.

Fundarluttakarar:

Foreldraumboð: Dávid Reinert Hansen, Nomi á Stongum, Gunnleyg Wang Jacobsen
Kommunustýrisumboð: Sofus Johannesen, Finnbogi Midjord
Læraraumboð: Mirjam Zachariasen
Skúlaleiðarin: Sonni Djurhuus

Fundar skrá:

1. Opin mál:
   - uppfylging ísv. parkeringsplássið
   - uppfylging ísv. tryggan skúlaveg
   - uppfylging ísv. málsetning fyri skúlan
   - uppfylging forskúli
2. Hølisviðurskiftini
3. Umrøða av framtíðarætlanum við skúlunum í Sunda kommunu
4. Gallup
5. Eftirmetingarskjal
6. Heimasíðan
7. Fíggjarætlanin
8.
9. -
10. Ymiskt, foreldrakaffi - skúlastýrið syrgir fyri kaffi

**1. Opin mál:**

- uppfylging ísv. parkeringsplássið
- uppfylging ísv. tryggan skúlaveg
- uppfylging ísv. málsetning fyri skúlan
- uppfylging forskúli

Gunnleyg hevur verið í sambandi við kommununa í samband við tryggum skúlavegi. Ynski er at fáa ljós á parkeringsplássinum. Ynski er eisini at fáa ein geirða til børnini, at ganga ígjøgnum so børnini tryggari kunnu ganga uttan ótta fyri bilum. Einki svar er komið frá Syderbø viðvíkjandi endaligu loysnini av trygga skúlavegnum. Ynski er, at vegurin verður saltaður, áðrenn foreldrini koma við børnunum í skúla um morgunin í kavaveðri. Somuleiðis er ynskið um at okkurt verður gjørt við ánna við parkeringsplássið so ikki alt rennir yvir í áarføri. Viðvíkjandi forskúla hevur skúlin gjørt alla fyrireikingina hesum viðvíkjandi. Vit skulu tó tosa saman við barnagarðin hesum viðvíkjandi.

**2. Hølisviðurskiftini**

Einki er frætt viðvíkjandi hølisviðurskiftunum. Sofus veit, at ein loysn er í eygsjón. Vit vóna tað besta. Enn er tó eingin loysn.

**3. Umrøða** av framtíðarætlanum við skúlunum í Sunda kommunu

Foreldrini eru innstillað uppá, at hetta er ein gongd leið við skúlasamtarvinum. Hetta er tendensurin í øllum Sundalagnum. Tingini skulu tó mýkjast eitt sindur meira. Tilmæli skal nú

gerast so kommununar partur er liðugur til jólar.

4. **Gallup**
   Nøgdsemiskanning hava vit havt hvørt skúlaár. Vit skulu miða ímóti at vit hava hana aftur í 3. viku í januar. Skulu gjøgnumganga spurningarnir fyri at vita um nakað skal broytast. Hetta skal gerast áðrenn jól. Hvussu skulu vit sum skúlastýri kunna foreldrini um møgulig tiltøk í sambandi við úrslitið av kanningini. Vit hava fund um nøgdsemiskanningina hóskvøldið 26.11.09, kl.19.00. Evni: Viðgerð av spurningunum í nøgdsemiskanningunum.
5. **Eftirmetingarskjal**
   Lærarnir ynsktu ikki at brúka hetta skjalið einsamalt, men í samband við foreldravitalurnar. Vit koma nú at hava tvær foreldravitalur árliga. Eina um heystið og eina um várið.

6. **Heimasíðan**
   Fundarfrásagnir í skúlastýrinum skulu út á heimasíðuna.
7. **Fíggjarætlanin**
   Komandi ár eru sett 4200 kr. av pr.næming. Kannast skal um útreiðslurnar til innbúgvið kann setast við síðuna av fíggjarætlanini. So keypast kann teldur og videokanónir. Fíggjarætlanin fyri komandi ár skal justerast.
8.

9. -

10. **Ymiskt, foreldrakaffi - skúlastýrið syrgir fyri kaffi**
    Skúlastýrið skipar fyri drekka og gløgg til jóla hugnakvøldið mikukvøldið 16.12 kl. frá kl.17.00 - 19.00.